
*Í 1999 ætlaði fíggjarmálaráðharrin Oskar Lafontaine at hækka felagaskattin, men ein bólkur av fyritøkum forðaði hesum*

Tað hevur nervað mannarættindini, at vesturlendskar stjórnir hava lagt so stóran dent á handil og áhugamálini hjá sínum egnu fyritøkum. Ein leverandørur til amerikansku verjuna, DynCorp, sum er skuldsettur fyri at hava brotið mannarættindini ferð eftir ferð, gav republikanska flokkinum 150.000 dollarar. Stjórnin hjá Bush gav fyritøkuni eftirlitsuppgávur í Irak, eftir at Saddam Hussein var fallin. ES gjørdi tollsamgongu við Turkaland, samstundis sum Evropatingið segði seg stúra fyri, at landið breyt mannarættindini og stúrdi fyri fólkamorði móti kurdarum har eysturi í Turkalandi. Ár um ár gjørdi Vesturheimurin lítið, tá stýrið hjá Sami Abacha generali framdi brot á mannarættindini í Nigeria. Handils- og oljuáhugamál vóru við yvirlutan. USA styðjaði talibanarnar í Afghanistan líka til 1997, hóast teir framdu ræðulig brot á mannarættindini, kúgaðu kvinnur, avrættaðu fólk alment og stóðu fyri ósemjiligari islamiskari fundamentalismu. Ein høvuðsorsøk var, at amerikanska oljufelagið Unocal hevði gjørt avtalu við Taliban-stýrið um at byggja ein gassleidning fyri tvær miljardir dollarar og ein oljuleidning fyri 2,5 miljardir dollarar úr Turkmenistan gjøgnum Afghanistan til Pakistan.



Tað stendur lítið mætari til í Saudiarabia, tá tað ræður um mannarættindi, men útlendskir myndugleikar vilja ikki seta síni viðurskifti við hetta oljuríka fúrstadømi í váða. Tey gera framvegis landið út við útgerð, sum kann brúkast til tortur og aðra ringa viðferð av fangum. Í tíðarskeiðinum 1980-93 góðkendu amerikanskir myndugleikar søluavtalur um ma. fótleinkjur og hondjørn at læsa tumlarnar fastar við.

Vesturheimurin heldur eisini fram at gera seg til vins við Kina, tí vesturlendskar fyritøkur hava góðar marknaðarmøguleikar har. So hevur tað minni at týða, at Kina loyniliga fongslar kristin og politiskar frávíkjarar, sýtir arbeiðarafjøldini hennara rættindi sambært mannarættindarkonvensjónini og brúkar fongslini til tvingsilsarbeiði.

Mundu menningarlondini ikki lurtað, um eitt land sum USA, ið hevur so stóran marknað og kann gera so stórar íløgur, hevði kravt, at ein treyt fyri góðum handilssambandi er, at mannarættindini verða vird? Finst nakað land í alheims búskapinum, sum hevur ráð at vísa slíkari treyt frá sær og við tí handilssambandinum við Vesturheimin? Er tað ikki so, at Vesturheimurin hevur slept mannarættindarmálinum, hóast hann ikki var noyddur til tað?

## Demokratiið viknar

Tað eru ikki bara mannarættindini, sum eru burturvíst. Stóran part av 20. øld viknaði demokratiið í mun til marknaðarkreftirnar. Ongastaðni sæst hetta so væl sum í USA, framherjanum fyri fólkaræði um allan heim, har tað javnan verður loyvt, at demokratiið verður sett lægri enn kapitalisman hóast øll uppáhald um, at demokratiið kemur í fyrstu røð.

Tá Boris Jeltsin kleyv upp á ein stríðsvogn á Reyða Torginum í august 1991, segði George Bush eldri, at demokratiið mátti ráða. Hann meinti neyvan við eina skipan, har fólk sluppu at atkvøða. Hann ynskti heldur, at Russland fekk eina skipan, sum gagnaði amerikanskum áhugamálum og samsvaraði amerikanskum búskaparligum virðum. Ein einavaldsskipan, lík henni í Singapore, hevði vist verið ófør. Mangir íleggjarar í Amerika og øðrum londum vestanfyri halda, at Russlandi tørvar ein lagaligan einaræðisharra.

Noreena Hertz skrivar, at tá hon var í Russlandi frá 1991-93, varð hon sannførd um, at tær amerikansku uttanríkispolitisku avgerðirnar vóru grundaðar á ta fatan, at amerikanska skipanin og hennara virði verða best vard við einari globalari skipan, grundað á tørvin hjá privata kapitalinum, íroknað ognarrættin og fría atgongd til marknaðin.

Fleiri dømi benda á slíkt. Í 1953 fekk CIA tað vælumtóktu stjórnina hjá Mossdeq frá í Iran, tí hon kravdi, at oljufelagið Anglo-American – seinni BP – skuldi leggja størri part av vinninginum eftir seg í Iran. Shahurin, sum kom til ræðið, broytti hesa avgerð beinanvegin.

Í 1954 hjálpti USA til at koyra tann valda forsetan í Guatemala, Jacobo Arbenz, frá, tí hann hevði tjóðartikið 80% av United Fruit Company. Amerikanski uttanríkisráðharrin John Foster Dulles hevði fyrr starvast í sakføraravirkinum, sum nú umboðaði United Fruits, og beiggi hansara, CIA-sjefurin Allan Dulles, hevði sitið í legatstýrinum hjá fyritøkuni. Eitt einaræði, styðjað av CIA, tók við valdinum og framdi í 40 ár tey ringastu brotini á mannarættindini í øllum Vesturheiminum.

Í 1964 hjálpti USA hernaðarligum politikarum at koyra ta fólkavaldu stjórnina í Brasilia frá, tí hon var ov vinstrasinnað. Tey næstu 30 árini stýrdu einaræðisharrar Brasilia.

USA styðjaði ódemokratisk stýri sum Ferdinand Marcos á Filipsoyggjunum, Pinochet í Chile og apartheidstjórnina í Suðurafrika. Kirkpatrick, ST-sendiharri hjá Reagan, segði, at hesi autoriteru stýri vóru ódemokratisk, korrupt og kúgaðu fólkið, men USA kundi samstarva við tey, tí tey vóru fyri einari opnari búskaparligari skipan. Harafturímóti vóru totaliter stýri sum á Kuba, í Sovjet og Kina ónd, tí tey høvdu eftirlit við øllum samfelagnum, serliga búskapinum sum var afturlatin fyri privatum fyritøkum og útlendskari atgongd.

Alla síðstu øld fjaldi USA sín uttanríkispolitikk, sum er grundaður á handilslig atlit, aftan eitt tjald av demokratiskum fyrilitum.

Næstan øll kapitalistisk lond gera nú tað sama sum USA. Kappingin um búskaparlig áhugamál er komin í staðin fyri hugsjónarligar munir í heimspolitikkinum. Fleirtjóða fyritøkurnar eiga ein størri part av ognarviðurskiftunum í hesi nýggju heimsskipanini enn mangar stjórnir. Tá stórkapitalurin og statirnir hava ymisk áhugamál eru tað oftari og oftari fyritøkurnar, sum seta dagsskránna.

Ongastaðni sæst hesin misjavnin so væl sum á høvuðsborgini hjá heimshandils felagsskapinum WTO í Genève. Har verða avgerðir tiknar, sum avmarka møguleikarnar hjá statunum at tryggja áhugamálini hjá borgarunum, eisini í teimum førunum, tá statirnir vilja tað.

Eitt dømi er, at í 1996 gjørdi Massachusetts av, at tey vildu ikki gera almennar sáttmálar við fyritøkur, sum høvdu handil við ella í Burma, tí landið breyt so ofta mannarættindini. Unilever, Siemens og tveir hollendskir bankar vóru saman við øðrum evropeiskum fyritøkum millum teirra, sum tóktust at tapa uppá hesa avgerð. Fyritøkurnar fóru til verka í Brússel. Tað endaði við, at ES hótti við at leggja málið fyri WTO við teirri grundgeving, at avgerðin var ein órættvís handilsforðing.

Samstarvsfelagsskapurin ASEAN ætlar at stýra handlinum í Suðureysturasia frá 2006. Tað fer helst at hava við sær, at myndugleikarnir í Vietnam noyðast at taka forboðið móti at flyta inn sigarettir av.

Í 1966 samtykti Evropatingið við 366 atkvøðum fyri og ongari ímóti at seta forboð fyri hormonviðgjørdum kjøti, tí hildið varð, at tað kundi elva til krabbamein, minka gitnaðarførið hjá monnum og framskunda kynsbúningina hjá børnum. Tríggjar mánaðir seinni kærdi USA – eftir kravi frá stórum fyritøkum – málið fyri WTO sum ólógliga innflutningsforðing. Árið eftir gav WTO amerikanarum viðhald.

Ein leiðregla hjá WTO er at forða fyri forboði móti at flyta inn egg frá búrhønum. Tað merkir, at amerikanskir framleiðarar kunna selja egg bíligari enn evropearar, um búrhønur verða forbodnar her.

Í roynd og veru hevur WTO næstan altíð, tá umhvørvismál hava verið fyri, dømt samsvarandi áhugamálunum hjá vinnulívinum heldur enn ynskjunum frá demokratiskt valdum stjórnum. Uttan at standa nøkrum til svars hevur WTO avmarkað okkara møguleikar at velja, hvat vit vilja eta, og sett seg oman fyri lógir samtyktar á demokratiskan hátt.

Í fleiri mátar hevur WTO roynst konstruktivt. Áðrenn felagsskapurin varð stovnaður førdu handilsligar ósemjur ofta til drúgv og oyðileggjandi handilskríggj. Í 1930-unum til dømis var miðal tollurin í heiminum 45%, og rík lond avbyrgdu seg og vóru sjálvbjargin. Kortini er tað so, at við at noyða fríhandilsdoktrinir uppá statir, ger WTO tað alsamt tvørligari hjá londum ikki at seta handilslig áhugamál fremst, eisini í teimum førum, tá veljararnir ella stjórnirnar hava hug at fremja onnur áhugamál. Soleiðis viknar tann tjóðskaparligi suvereniteturin. Alt samalt til frama fyri evropeiskar og amerikanskar stórfyritøkur.